VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lot til andøvsgul av suðri og regn av og á, annars mjørki í støðum. Hitin milum 14 og 17 stig.



Veðrið mikudagin:
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn ella mjørki. Seinnapartin støkkur hann vesturum til útsynning og tað klárar í. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið hósdagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og eitt skifti møguliga regn, annars támut veður. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið fríggjadagin og leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, leygardagin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 12 og 16 stig.

Summardámur í Elduvík

Sunnudagin vaks fólkatalið í Elduvík við fleiri 100 %, tá fólk aðrastaðnis frá leitaðu sær til vøkru bygdina í rættiligum summarveðri. Hetta vóru fyri tað mesta barnafamiljur, sum nýttu góða summardagin uttandura í vøkru náttúruni

SUMMAR
Ragnhild Ellingsgaard

Børnini hugnaðu sær og svomu í ánni, tá Elduvík sunnudagin var karmur um føroyskt summar, tá tað er allarbest.
Mynd: Eirikur Lindenskov

Farna vikan hevði alskins veður at bjóða okkum føroyingum. Meðan høvuðsstaðurin fyri tað mesta lá undir mjørka, so kundu fólk á øðrum plássum í Føroyum frøða seg um eina tað bestu summarvikuna, vit hava havt hetta summarið.

Elduvík var einki undantak í so máta. Tá mjørkin liggur yvir Havnini, merkir hetta samstundis eina góða ætt í Elduvík, og alla farnu vikuna hevur veðrið verið av tí allarbesta.

Sunnudagurin var ein vakur endabrestur á eini framúr viku, og sólin skein bæði oman og niðan í bygdini við vakra umhvørvinum.

Vanliga liggur fólkatalið í Elduvík um tey 20 fólkini, men sunnudagin vaks tað við fleiri 100%. Hetta vóru fyri tað mesta barnafamiljur, sum tóku børn og matpakkar undir hond, og síðan leitaðu sær til ánna í Elduvík. Runt bygdina sótu fólk úr øllum Føroyum og nýttu hvøn annan og góða veðrið, meðan børnini spældu sær í ánni.

Blikalogn var allan dagin, og hitin dittaði sær enntá uppum 20 gradir. Hetta var føroyskt veður, sum vit kundu ynskt at sæð meiri til.

Jóhanna Nielsen, sum til dagligt rekur matstovuna Lonin í Elduvík, minnist seg ikki nakrantíð hava sæð so nógv fólk í bygdini.

– Sunnudagurin var púra óvanligur fyri okkum bygdarfólk. Elduvík var full av fólki ymsastaðni frá, og rættur summardámur var yvir øllum, greiðir hon frá.

Um ein hevur børn, so er áin í Elduvík eitt rætt »trekkplástur« ein góðan summardag, og soleiðis minnist Jóhanna tað altíð hava verið.

Vakra umhvørvið kring bygdina hevur eisini drigið fólk til sín gjøgnum árini, men tó var sunnudagurin heilt serligur. Vónandi fáa vit fleiri av hesum, áðrenn myrkrið og veturin aftur sníkja seg yvir Føroya land.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	7
Qaqortoq	5
Ammassalik	–
Saint John's	17
Halifax	20
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	11
Lerwick	17
Aberdeen	18
London	19
Tromsø	10
Bergen	23
Oslo	–
Stokkhólm	24
Keypmannah.	22
Helsinki	18
Moskva	18
Berlin	24
Warzawa	25
Kiev	21
Bukarest	28
Paris	18
Madrid	29
Róm	30
Malorca	29
Athen	32
Malta	–
Tunis	40
Beijing	–
New Dehli	33
Bangkok	31
Jakarta	31
Sydney	16
New York	32
Miami	31
Los Angeles	20
Meksikobýur	21
Panama	29
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	15

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 1001 hPa yviri á Suðurlandinum fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týskvøldið.

Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og kuldabrúgvin haðani fer eysturum Føroyar mikudagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 04/08 kl. 06⁰⁰– 05/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,8°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,6 mm – mált frá 04/08 kl. 06⁰⁰– 05/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 0,6 mm

BILLUTIR
F
F

VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin longst frá jørðini
1. aug.: Seinna kvarter
8. aug.: Tendring
10. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svinoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svinoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
6. aug	05.15	17.41	04.15	16.41	04.30	16.56	07.15	19.41	08.15	20.41	03.30	15.56	02.30	14.56	05.30	17.56	06.30	18.56	05.00	17.26	06.15	18.41
7. aug	06.08	18.35	05.08	17.35	05.23	17.50	08.08	20.35	09.08	21.35	04.23	16.50	03.23	15.50	06.23	18.50	07.23	19.50	05.53	18.20	07.08	19.35
8. aug	07.02	19.28	06.02	18.28	06.17	18.43	09.02	21.28	10.02	22.28	05.17	17.43	04.17	16.43	07.17	19.43	08.17	20.43	06.47	19.13	08.02	20.28
9. aug	07.53	20.19	06.53	19.19	07.08	19.34	09.53	22.19	10.53	23.19	06.08	18.34	05.08	17.34	08.08	20.34	09.08	21.34	07.38	20.04	08.53	21.19

5 707265 100029 >